# Kjak

Landsnevnd Unga Tjóðveldsins

## Frí fosturtøka

Unga Tjóðveldið vil, sum øll vita, hava einar sjálvstøðugar Føroyar. Spurningurin er, hvat tað er fyri republikk, vit vilja liva í, tá ið hetta stríð einaferð er komið at enda. Vilja vit vera eitt land, har ið helmingurin av fólkinum ikki sleppur at ráða yvir egnum kroppi? Tí at tað er júst soleiðis, sum støðan er nú.

Føroyska fosturtøkulógin er av teimum allarstrangastu. Í teoriini er fosturtøka bara loyvd undir ekstremum umstøðum, so sum neyðtøku, og um lívið ella heilsan á kvinnuni er í vága, vegna likamliga ella sálarliga sjúku. Vit vita tó øll, at hesar reglur ikki altíð verða fylgdar. Ein føroysk genta/kvinna má spæla eitt slag av russiskari roulettu, tá ið tað snýr seg um, at fáa atgongd til at fáa fosturtøku í Føryum. Persónligi moralurin hjá læknanum kann gera av um kvinnan fær ta viðgerð, sum hon vil hava. Harafturat verða kvinnur, sum av neyð royna at fremja fosturtøku á seg sjálvar, hildnar at vera brotskvinnur, ið kunnu revsast, sambært føroysku lógini um fosturtøku. Unga Tjóðveldið hevur hesi ynski:

1. Føroyska kvinnan skal sjálv sleppa at velja, um hon vil hava fosturtøku ella ikki. Landið eigur at stuðla kvinnuni og at gera sosialu umstøðurnar so frægar, at hon trygt kann gera av at gjøgnumføra barnsburðin ella at fáa fosturtøku. Hon eigur at fáa alla tað umsorgan, sum henni tørvar, og tryggjast skal, at hon undir øllum umstøðum tekur avgerð út frá egnum, fríum vilja og ikki er undir trýsti frá øðrum. Tvingað fosturtøka er líka forkastilig sum tvingaður barnsburður, tí at í báðum førum verður gjørt inn á sjálvsavgerðarrættin hjá kvinnuni.
2. Vit eiga at tala at felagsskapum sum Føroya Pro-Vita, sum uttan mótmæli sleppa at leggja faldarar við upplýsingum um fosturmenning, har nógvar av upplýsingunum ikki eru vísindaliga eftirfarandi, undir liðini á eftirfarandi tilfari um heilsu, medisin og sjúku, á apotekum og inni í bíðirúmum hjá læknum. Slíkir faldarar eru átrúnarliga/moralistiskt grundaðir – ikki læknafrøðiliga grundaðir.
3. Kvinnur skulu hava atgongd til trygga og lógliga fosturtøku í egnum landi, og skulu ikki verða noyddar til at fara til Danmarkar at fáa henda grundleggjandi rætt framdan. Tað, at gentur og kvinnur noyðast at fara av landinum, ger eisini mismun á kvinnum, tí at tað eru ikki allar, ið hava ráð til at gjalda fyri ferðina.

Harafturat heldur Unga Tjóðveldið, at allir politisku flokkarnir (eisini egni móðurflokkur okkara) eiga at taka eina greiða støðu til hetta mál, so at fólkið veit, hvar tað hevur teir og kann velja við góðari samvitsku. Fosturtøka eigur ikki at verða viðfarin sum ein kontroversiellur smálutur, ið skal skúgvast til viks í almenna rúminum.

Rætturin á ráða yvir egnum kroppi er ein grundleggjandi mannarættur, og hetta sæst serliga, tá ið hugsað verður um, at nøringargøgnini hjá kvinnuni ígjøgnum søguna hava verið (og verða nógvastaðni enn) brúkt ímóti henni sum eitt kúgingartól.

---



Heðin D. Poulsen
*Landsnevndarlimur í Sjálvstýrisflokkinum*

## Aksel kann blíva løgmaður

Veljarakanningarnar geva Sjálvstýrisflokkinum 2 tingfólk og er triði tinglimurin í eygsjón. Góð tíðindi fyri Sjálvstýrisflokkin, sum eftir næsta val kann koma í lyklastøðu, tá løgmaður skal veljast.

Hóast okkara semjusøkjandi løgmaður fær góða undirtøku millum fólk, er tað eingin sjálvvirkandi skipan sum sigur, at Kaj Leo verður løgmaður aftur. Tí eiga flokkar og veljarar at umhugsa, hvør annar persónur kann blíva løgmaður.

Eftir at Jóannes Eidesgaard mynstraði av og Javnaðarflokkurin so sannførandi peikaði á ein nýggjan mann, kann Javnaðarflokkurin aftur vísa á egnan formann sum uppskot til løgmann. Um hetta verður veruleiki skal eg ikki siga, men um Javnaðarflokkurin framhaldandi fer at góðtaka afturhaldssinnaða politikkin hjá Fólkaflokkinum, verður trupult hjá Javnaðarflokkinum at sannføra veljaran og er trúvirðið hjá flokkinum í vanda.

**ABC og eingir reformar**

Undan seinasta vali lovaði ABC reformar, á skúlaøkinum, kommunuøkinum, samferðsluøkinum og innan fiskivinnuna. Enn eru eingir reformar framdir, og er tað mangt sum ber brá av, at tað er Fólkaflokkurin sum stendur í vegin fyri framtíðini.

Við Aksel kann Javnaðarflokkurin aftur fáa løgmann, men vil Javnaðarflokkurin samstarv við Sjálvstýrisflokkin, má Javnaðarflokkurin leggja á annan bógv og prógva, at flokkurin torir at fremja reformar, sum lovaðir vóru undan seinasta vali.

---

Nevndin fyri Ung fyri Miðflokkin

## Tjóð teirra útvaldu?

Nýggja ættarliðið av tjóðveldisfólki kunngjørdi í vikuni teirra boð uppá, hvussu Føroyar skal skipast sum republikk. Ikki kann sigast annað enn, at lesnaðurin er ræðandi.

Boðskapurin er greiðurvegurin til republikkina Føroyar skal m.a. grundast við blóði. Sum so er ikki nakað løgið við tí. Heimssøgan er á tremur við hetjum, ið hava latið lív fyri at fólk kunnu gerast fræls, men tað er ikki blóð martýranna, ið ungu tjóðveldisfólkini ætla at byggja republikk teirra á, men blóð teirra óseku, fostrini í móðurlívinum.

Sanniliga er tað ein skelkandi lesnaður, hendan fyrsta almenna útmeldingin hjá nýggju nevndini í UT. Eitt ynski um at skerja tann grundleggjandi rættin til lív. Við einari avoldaðari frasu um rættin hjá kvinnuni at ráða yvir egna likami, skjýtur UT upp, at núverandi lóggáva skal býtast við fría fosturtøku. Rætturin til lív skal víkja fyri rættinum at ráða yvir egnum likami – tað vil siga, um tú av fyrstan tíð var so heppin at sleppa at liva.

Lat tað verða greitt, at núverandi fosturtøkulóg er ein stór skomm – hon tænir hvørki kvinnuni, barninum ella læknanum. Ongin kann tó við vissu siga, hóast UT ger eina roynd, hvat lógin í veruleikanum heimilar.

Men skommin er Løgtingsins. Móðurflokkur okkara – Miðflokkurin – hevur ferð eftir ferð reist spurningin um hesa ótíðarhóskandi lóggávu á tingi, men tingfólk flest ræðast at viðgera evnið, alt meðan avleiðingarnar taka dik á seg. Tað er alneyðugt, at Føroya Løgting tekur støðu til hendan spurning. Tað er uppgávan hjá okkara fólkavaldu at beina burtur allar trupulleikar, m.a. sosialar og fíggjarligar, ið kunna elva til fosturtøku. Onki barn skal verða noktað rættin til lív í hesum ríka landi orsaka av, at vit sum samfelag skjóta okkum undir ikki at hava ráð at lata barnið liva.

Rætturin til lív má virðast, og eru vit í UfM sera takksom fyri tað arbeiðið, sum Pro-Vita ger. Við teirra arbeiði leggur Pro-Vita rødd til tey, ið vit aldrin hoyra málið á. Tí gerst tað heilt marghátttligt, tá UT ynskir at skerja talufrælsið hjá júst hesum felagsskapi. Tað er hvørki upp til UfM, UT ella Løgtingið at avgera, hvat liggur í bíðirúmum runt landi. Talufrælsið er í gildi í Føroyum, fyri at tryggja, at øll verða hoyrd, eisini rødd teirra óføddu.

Eftir er bert at undrast á hesa framtíðar avskepladu republikk, ið unga tjóðveldisættarliðið ynskir at skipa. Eina republikk, har bæði rætturin til lív og talufrælsið verða skerd. Ein ræðandi mynd hómast av einum komandi forboðssamfelag, har bert tey fáu útvaldu sleppa at liva.

---

Jan Asbjørnson Joensen
*landsnevndarformaður*

## Sjálvstýrisflokkurin heldur gjørdar avtalur!

Í seinastuni er ivi sáddur um, hvørt Sjálvstýrisflokkurin fer at halda gjørda avtalu um verkætlan SALT.

Sjálvandi hevur tingið enn ikki viðgjørt umbønina um stuðul frá SALT út í æsir. Treytir skulu setast, so verkætlanin verður so fullfíggjað sum møguligt. Hvørt hetta skuldi havt verið gjørt til fulnar í nógv umrøddu skrivligu tilsøgnini frá flokksformonnunum, kunnu vit altíð diskutera.

Ein nýggj støðutakan krevur, at grundarlagið fyri støðutakanini er grundleggjandi broytt, og er tað ikki tilfeldið, eigur politiska skipanin ikki at broyta meining

Eg vil tískil staðfesta, at Sjálvstýrisflokkurin stuðlar og heldur gjørda avtalu við SALT, júst soleiðis sum undirskrivað av Kára P. Højgaard. Verkætlanin skal stuðlast, og peningur játtast í ár.